# havið og vatnið gevur okkum



*Elin Heinesen, stjóri í nýggja Vinnuframastovninum helt Grækarismessuròðuna í Havn sunnudagin*
*Mynd Jan Müller*

keldum, sker seg gjøgnum landslagið, klívur hamrarnar, har tað rennur oman eftir fjallasíðunum í áum, løkum og fossum og ofta eisini stendur steyrrætt upp í luftina í bardaga við vindin. Vatnið er allastaðni í ráligu luftini – sum alskyns littar skýggjaformatiónir, ið fara fúkandi eftir luftini og skapa flákrandi skuggar eftir grønu fjallasíðunum. Tú følir vatnið sum frískligt, rein luft í lungunum, tá tú andar. Tú merkir tað sum regn, ið pískar teg í andlitið. Sum sirm, ið sníkir seg innum klæðini hjá tær, so tú verður á kroppi eftir lítlari løtu. Ella sum mjørki, sum hylir alt, so tú einki sært og kanst blíva burtur og villast í tí.

## Vatnið myndar føroysku sálina

Tú kanst sigla í vatninum millum oyggjarnar. Tú kanst fiska í tí í áum og vøtnum og á sjónum – á seiðabergi ella frá bátum, og fáa fisk, sum er ein tann allarbesti og mest heilsugóði fiskurin í heiminum, m.a. tí vatnið kring Føroyar er so reint. Heitir streymar sunnanífrá Mexicoflógvanum og kaldir streymar úr Norðurhavinum møtast júst her og skapa eitt yðjandi lív í havinum kring oyggjarnar – bæði plantu- og djóralív, sum tú kanst kava niður í vatnið fyri at síggja og uppliva.

Vatnið er eisini ein orkukelda – føroyingar fáa heili 45 procent av orkun frá vatnorkuverkum, har veldugar turbinur senda streym út í føroyska elnetið. Og tú kanst drekka vatnið – tað er reint og smakkar frískligt og runt í mun til ofta harða vatnið á Evropeiska meginlandinum. Tað er kanska loyndarmálið aftanfyri, at føroyska ølið vinnur heiður ferð eftir ferð á útlendskum ølsmakkikappingum.

Føroyingurin beinleiðis mistrívist, tá hann ella hon ikki sær ella hevur atgongd til vatn. Vatnið er ein náttúrukraft, sum myndar føroysku sálina, tí tað myndar landslagið, vit liva í, og elvir til avbera skiftandi veðurlagið í Føroyum. Eina løtu er blikalogn og næstu løtuna er kolandi stormur. Vatnið er – samstundis sum tað er vakurt og lívgevandi – eisini svikaligt og lívshættisligt. Allir føroyingar kenna fólk, sum eru farin á sjónum ella eru druknað. Vatnið ræður fyri lívi okkara á klettunum. Tá stormarnir herja, má alt annað liggja stilt. Vit kunnu einki annað enn at geva okkum yvir og liva við hesum náttúrukreftum.

## Mugu vekja meir enn bara áhuga

Fyri tey, sum ikki eru von við at liva so tætt uppat sterkum náttúrukreftunum er møti við máttmiklu, stórbæru, vátu og ráu náttúruna í Føroyum eitt serstakliga intenst upplivilsi. Tú følir teg mikroskopiskt lítlan og prísgivnan elementunum millum hábærsligu fjøllini í Føroyum. Her merkir tú knappliga tín kropp á ein heilt annan hátt, enn tá tú ert inni á Evropeiska meginlandinum, har tú livir ein vardan dagligdag, stýrdur av klokkuni og fyltur á tremur av kunstigum stimuli. Og hetta kunnu vit brúka til okkara fyrimuns.

Vit hava sjálvandi eisini annað at bjóða enn bara vatn: Søgur og mentan okkara, kvæðini, stevnurnar og festivalarnir, Eivør og Teitur o.a. Vit hava so nógv áhugavert. Men um vit skulu vekja meir enn bara áhuga, mugu vit branda okkum uppá okkurt heilt serligt, tú ikki kanst uppliva nakra aðrastaðni. Tí tá fyrsti áhugin er vaktur fyri Føroyum, so smittar hann og breiðir seg sum ringar í vatninum til at umfata alt annað, sum er her, eisini – og tástani megna vit at draga fólk henda veg" segði Elin Heinesen m.a. í Grækarismessurøðu síni í Havn sunnudagin. Lesið eisini forkunnuga uppskot hennara um at brúka Sornfellið og kuplarnar har til upplivingar á síðu 4.



*Skótar og hornorkestrið settu sum vant sín serstaka dám á*
*Mynd Jan Müller*